# Newcastle áhugað í Saviola

Enska blaðið News of the World skrivaði í gjár, at Newcastle hevur sýnt áhuga fyri argentinska spælaranum Javier Saviola, sum er sáttmálabundin við Real Madrid. Tað verður ikki roknað við, at 26 ára gamli Saviola kann vinna sær pláss á liðnum úr Madrid, og tí kann hann verða leigaður til enska felagið hetta kappingarárið.



# Arsenal selur bakk

Arsenal hevur selt bakkin Justin Hoyte til Middlesbrough fyri umleið 30 milliónir krónur. 23 ára gamli Hoyte hevur havt ilt við at vinna sær pláss á liðnum hjá Arsenal, og nú hava tey gjørt av at selja hann. Hoyte, sum hevur gjørt fýra ára sáttmála við Middlesbrough, hevur spælt 18 landsdystir fyri enska U21 landsliðið.

# Vágaliðið misti í Runavík

**Nú eru tað VB/Sumba og AB, sum hava atgongumerkini til bestu deildina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ætlanin hjá vágamonnum um at fótbóltur í bestu deildini skal vera har vesturi næsta kappingarár fekk eitt skot fyri bógvin leygardagin. Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin heilkiksaði tað hjá 07 Vestur í Leirvík, har teir næstbestu hjá Víkingi vunnu 2-1.

Leygardagin vitjaði 07 Vestur aftur í Eysturoy, og aftur hesa ferð var úrtøkan ikki tann, sum tað varð roknað við. Úrslitið var 1-1, og harvið misti 07 Vestur í oddastríðnum við AB og VB/Sumba, sum vunnu fulla úrtøku.

VB/Sumba hevði stórar trupulleikar við at fáa mál ímóti víkingunum, sum hildu tørn, inntil tað restaðu tjúgu minuttir. Pól Thorsteinsson royndi at sneiða framvið málverjanum, sum nýtti neyðbremsuna. Brotsspark og reytt kort til málverjan, og so skoraði VB/Sumba tríggjar ferðir.

Í Klaksvík tók tað eisini sína tíð, áðrenn AB fekk bilbukt við teimum næstbestu hjá KÍ. Dysturin var klokkan 14 og ikki klokkan 15, sum plagar at vera vanlig dystartíð hjá teimum næstbestu í Klaksvík. Tey, sum ikki møttu fyrrenn klokkan 15, fingu kortini øll málini. Tey vóru eisini eygnavitni til, at AB álopsspælarin við tí í Klaksvík væl kenda Sigurðsson eftirnavninum er málsøkin. Tróndur Sigurðsson skoraði tvær ferðir, og hann var við í uppspælinum til málið, sum Dion Jacobsen skoraði.

Tá ið Andrzej Stretowicz eftir stóran hálvan tíma eftir innlegg frá Tór-Ingar Akselsen legði 07 Vestur á odda í Runavík, tóktist tað sum um, at tað fór at enda við vágasigri, hóast spælið ikki var serliga sannførandi. Men soleiðis skuldi tað ikki vera. Øssur Dalbúð er málsøkin, og tað var hann, sum stutt undan steðginum javnaði til 1-1.

Hjá TB er tað aftur farið at bragda. Hesa ferð vunnu tvøramenn sannførandi 3-0 sigur á HB í Gundadali. Josef Bassene taldist aftur hesa ferð millum málskjúttarnar, og aftur hesa ferð skoraði hann við fínum langskoti.

Á Toftum vann heimaliðið 6-1 stórsigur á EB/Streymi, sum tað sær svart út hjá. Súni Fríði Barbá beinleiðis upp á fríspark og unglingaspælarin André Olsen skoraðu í 1. hálvleiki, og í 2. hálvleiki skoladu málini ígjøgnum EB/Streymamálið. Badara tvær ferðir og innskifti Eyðun Jacobsen tvær ferðir syrgdu fyri tennisúrslitinum, sum ber við sær, at B68 er á veg at fóta sær í kappingini um at sleppa undan at flyta niður.



*07 Vestur snávaði í Runavík, og nú eru tað AB og VB/Sumba, sum eru oddafiskarnir í stríðnum um uppflyting til Formula-deildina*

## Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum**

Man kann roliga siga, at ki blivu straffadir i dag«

Gott kempa Skàla àttu tad mesta av dystinum, spell at tit ikki fingu fleiri màl. Til borgarstjòran dysturin er ikki avgjørdur fyrrenn dysturin er briksldur av. Skàla vidhaldsfòlk«

Gudmund „sassy“ Nielsen, you go Nielsen, you go«

B68 hevdi B36 a reyvuni. men eitt uppskot til arsins talent Johan Simun Solskjær. super sub. koyr a B68«

Val dòmt av Dagfinni ì havn, vit taptu og teir vunnu. Hatta er fòtbòltur, heilsan eb/streyma fjeppari«

Arnhold berg var tann besti spælarin hjà skàla. Var klàrt tann besti a vøllinum. Nær far hann landlidsbod?«

Hattar var ikki straffi«

Latid dòmararnar fàa frid - spælarnir stinka - hyggi at fifa rankinglistanum so finna tit prògvini...«

Skàla àtti eisini eitt straffi koyr arnhold à landslidi hann rular«

Endiliga ein kjansur at hàla seg fram, nù tà eb tapti! Men tà møguleikin er har, taka vit ik av, forb kediligt! Heilsan ein skuffadur b36'ari!«

## FAKTA um 1. deild

**VB/Sumba-Víkingur 3-1 (0-0)**
1-0: Pól Thorsteinsson br 65.
2-0: Hallur Dam Joensen 77.
3-0: Pól Thorsteinsson 83.
3-1: Hjartvard Hansen 88.
**Reytt kort:** Mortan Joensen, Víkingur, 70.

**NSÍ-07 Vestur 1-1 (1-1)**
0-1: Andrzej Stretowicz 36.
1-1: Øssur Dalbúð 42.

**HB-TB 0-3 (0-1)**
0-1: Josef Bassene 21.
0-2: Dan Mortensen 49.
0-3: Gunnleif Olsen 52.

**KÍ-AB 0-3 (0-0)**
0-1: Tróndur Sigurðsson
0-2: Dion Jacobsen
0-3: Tróndur Sigurðsson

**B68-EB/Streymur 6-1 (2-0)**
1-0: Súni Fríði Barbá
2-0: André Olsen
3-0: Badara
4-0: Badara
5-0: Eyðun Jacobsen
6-0: Eyðun Jacobsen